sosialurin telf. 14720. 11820
box 76, 3800 Tórshavn
Útgevari: p/f sosialurin
Fyritaks- og blaðstjóri: Tórfinn Smith (ábyrgd)
Blaðmenn: Høgni Djurhuus
Jóhann Mortensen
Jan Müller
Lýsingar: Arne Thomsen
Uppseting: Sosialurin
Prent: Dimmalætting

Borið frukt

VIÐ VALSTRÍÐIÐ til løgtingsvalið í 1970 legði javnaðarflokkurin til brots undir heitinum »fyri ídnaði í sjeytiárunum«. Hetta, tí flokkurin ásannaði, at neyðugt var við alternativum vinnuvegum kring í oyggjunum.

EIN BLAÐGREIN í dag vísir, at í fjør komu útvið 250 arbeiðspláss innan ídnaðin afturat í Føroyum. Somuleiðis vísir blaðgrein, at ídnaðaríløgurnar, umframt íløgurnra í fiskiídnaðin, í fjør vóru 75 mill. kr. Hetta er um 18 pst. av privatu íløgunum, meðan ídnaðaríløgurnar bert lógu um 7 pst. av privatu íløgunum í 1971.

HESI ÁRINI ERU hundraðtals arbeiðspláss skapt, og øll hesi árini hevur javnaðarflokkurin havt ídnaðarmál um hendi í Tinganesi. Flokkurin hevur í verki sýnt, at hann arbeiðir út frá meginregluni: »arbeiði til allar hendur«.

Í HESUM SKEIÐNUM eru Ídnaðargrunnurin og Menningargrunnurin fingnir í lag. Lániheimildirnar frá Egnsudviklingsfonden eru viðkaðar, Ídnaðarstovan er stovnað o.s.fr. Tað næsta verður ein »menningarstova«, sum skal ráðleggja og samskipa øll nýggj arbeiðsskapandi tiltøk.

MÁL FLOKSINS HEVUR sanniliga borið frukt!

jomo

Fyrst og fremst til framleiðslu

VIÐ ÁVÍSUM millumbilum kastar Dimmalætting landsstýrinum fyri at hava økt uttanlandsskuldina í so stóran mun, at í dag skyldar hvør føroyingur 20.000 kr. í útlondum.

HETTA GER Dimmalætting, hóast hon veit — ella átti at vita — at ongantíð eru so stórar og nógvar íløgur gjørdar í fiskifør, fiskiídnaðin, annan ídnað, farmaskip, tænastuvirksemi, skrivstovu- og handilsbygningar og í kommunala útbygging kring í landinum sum í hesum landsstýrisskeiðunum. Okkum vitandi hevur Dimmalætting ikki annað enn fegnast, tá ein nýggjur bátur er komin til landið ella tá onkur handilsbygningur er tikin í brúk.

ALT HETTA hevur kostað. M.a. í útlendskari lántøku. Men tað er allar helst ikki gingið upp fyri Dimmalætting enn. Hon hevur á ongan hátt seriøst viðgjørt teir samfelagsligu trupulleikarnar tey seinastu árini ella megnað at sett teir í eitt størri perspektiv. Hon hevur bert tosað um góð innløguár og komin við leysum pástandum.

SEINASTU UPPLÝSINGAR úr Hagdeildini siga við fyrivarni, at nettoskuld føroyinga í dag er 760 mill. kr. Hetta svarar til 17—18.000 kr. pr. íbúgva. Men sammeta vit nettoskuldina við bruttotjóðarútrøkuna í fjør, sum er væl omanfyri tvær milliardir kr., er hon lítil, tá vit t.d. sammeta hana við eina familju, sum hevur bygt sær eini hús. Teirra skuld er fleirfalt ársinntøkuna. Hetta er kanska ikki nakað sammetingargrundarlag, men gevur eina mynd av lutfallinum.

DIMMALÆTTING gevur — sjálvandi — lesarum sínum ta fatan, at tað er landskassin, sum hasir »ódugiligu« flokkarnir umsita, ið eigur alla skuldina. Hóast vit ikki hava nakra sundurgreining av skuldini tøka, so vita vit, at telefonverkið og SEV eiga ein part, kommunurnar ein, farma- og fiskiskipaflotin ein, at privatar vinnu- og handilsfyritøkur eiga ein og at landskassin eigur ein stóran part. Ein partur, sum eftir tí sum búskaparfrøðingar siga, fyrst og fremst er farin til vinnulig endamál øllum Føroya fólki at gagni — uttan Dimmalætting — eftir øllum at døma!

TAÐ HEVÐI ongantíð verið betur, um vit vóru sloppin undan uttanlandsskuldini, men hvør skuldi so havt fíggjað útbyggingarnar. Dimmalætting hevur kanska eitt svar?

jomo

Inntøkupolitikkur — lønarpolitikkur:

Sosialistar mugu altíð berjast móti stjórnarligari uppílegging í lønarviðurskiftir

Inntøkupolitikkur - Lønarpolitikkur er heitið á eini grein í tí seinasta Framanum. Vit loyva okkum at endurprenta greinina, sum John Mortensen hevur skrivað:

Í kapitalismuni ávirkar løn búskapin á tveimum síðum. Løn er í fyrra lagi ein kostnaður í framleiðsluni (útreiðsla fyri keyp av vøruni arbeiðsmegi), í øðrum lagi er løn tað, sum skapar ein part av eftirspurninginum eftir vørum og tænastum (lønin er tað sum figgjar reproduktión av arbeiðaraklassanum).

Borgarlig búskaparfrøði framleggur altíð løn sum bert ein kostnað, eina útreiðslu. Tí mæla borgarligir búskaparfrøðingar eisini altíð til at leggja uppí lønarviðurskiftini, tá landsbúskapurin skal »bjargast«.

Tann fyrsti mátin, sum tann borgarligi staturin í øllum londum brúkti fyri at steðga »óynskiligum« lønarútviklingi, var at banna stovnan av fakfeløgum.

Men eftirhondini eydnaðist tað arbeiðaraklassanum at vinna rættin til at skipa seg í fakfeløg, og sum fakfelagsrørslan bleiv meira umfatandi, so noyddist staturin at brúka onnur ráð, tá kapitalurin kravdi stuðul til at stýra lønarviðurskiftunum. Í staðin fyri at banna fakfeløgunum setir staturin nú mark fyri á hvønn hátt arbeiðarnir kunnu brúka fakfeløgini í lønarstríðnum, t.d. við at avmarka rættin til at nýta verkfallsvápnið (semingsstovnar, arbeiðsrættur).

Tó hava slíkar atgerðir ikki verið nóg mikið til at halda lønum niðri á eini fyri kapitalin rímiligari stødd. Tí hevur statsliga uppleggingin funnið aðrar formar enn teir reint løgligu.

Teir nýggju formarnir eru brúkiligir av tí at nærum allar lønarsamráðingar verða førdar sentralt. Uppílegging í lønarviðurskiftir er tað, sum rópt verður inntøkupolitikkur.

Av tí at inntøkupolitikkur tá saman um kemur altíð er um at halda lønum niðri, ongantíð øðrum inntøkuformum, hevði orðið lønarpolitikkur verið rættari, sjálvt um inntøkupolitikkur í tí politiska tjakinum fevnir um allar statsligar avgerðir sum ávirka inntøkurnar í øllum samfelagnum.

Óbeinleiðis uppílegging

Statsligar uppíleggingar í lønarviðurskiftir fyri at minka um lønarkostnaðin hjá kapitalinum eru av ymiskum slag. Meira ella minni beinleiðis. Tað er óbeinleiðis uppílegging, tá staturin roynir at ávirka lønarviðurskiftini uttan at hótta við ella seta sanktiónir í verk.

Tað fyrsta stigið í statsligari uppílegging er oftast, at tingið ella stjórnin mælir samráðingarpørtunum til at hava samfelagsbúskapin í huganum og vísa samfelagssinni. Tílík tilmælir eru á ongan hátt bindandi, men í teimum førum har stjórnin og fakfelagsleiðslurnar liggja nær hvørjum øðrum t.e. tær hava somu uppfatan av teim aktuellu og komandi búskaparligu viðurskiftunum, er stórur møguleiki fyri at tilmælini verða fylgd. Er tað ikki so, fáa hesi tilmælir lítlan ans.

Næsta stigið í uppíleggingini er, at serfrøðingar (t.d. búskaparráðið) koma við »neutralum« frágreiðingum um støðuna og útfrá teimum mæla til at samfelagstørvurin verður uppfyltur. Hesir serfrøðingar eru »neutralir« á tann hátt, at teir ikki eru beinleiðis knýttir at nøkrum av pørtunum á arbeiðsmarknaðinum ella stjórn. Teir eru sjálvandi ikki neutralir eftir einum klassasjónarmiði. Teirra ráð verða givin út frá teimum áhugamálum totalkapitalurin hevur í ti aktuellu støðuni. T.v.s. teirra ráð eru so at siga innrættaði eftir tí, sum tann kapitalistiska skipanin í sær sjálvum krevur, heldur enn eftir tí, sum teir einstaku kapitalistarnir krevja.

Munurin á hvussu tilmælir frá serfrøðingum og stjórnarpolitikkarum verða móttikin hongur saman við, at serfrøðingar leggja síni tilmælir fram sum úrslit av óheftum visindaligum arbeiði. Hetta hevur helst størri týdning í teimum førum har stjórnarflokkarnir og leiðslurnar í fakrørsluni ikki eru knýttar til hvønn annan. Oftast tá stjórnin ikki er sosialdemokratisk.

Tað triðja stigið í óbeinleiðis statsligu uppíleggingum er, at stjórnin upp undir sáttmálasamráðingar boðar frá broytingum í skattinum og falli í statsútreiðslunum. Grundarlagið fyri tílíkum tiltøkum er ein uppfatan av, at tað er nettolønin sum arbeiðarin fyrst og fremst hevur áhuga fyri, og at inflatiónin hevur økt so mikið um tær vanligu arbeiðaralønirnar, at tær nominelt eru so høgar, at tær koma uppá tann progressiva partin av skattaskipanini.

Statsútreiðslurnar kunnu verða brúktar í royndunum at ávirka lønarviðurskiftini á tann hátt, at tað almennað við at broyta t.d. útbúgvingarmøguleikar og sosialar veitingar beinleiðis ávirkar livifótin hjá arbeiðaraklassanum.

Beinleiðis uppílegging

Í teim flestu vesturevropæisku londunum hevur staturin eisini lagt beinleiðis uppí lønarsamráðingarnar.

Við argumentum um at »vit eru øll í sama báti« hendur tað, at staturin leggur beinleiðis uppí lønarsamráðingar við at gera eitt semingsuppskot til lóg. Tær uppgivnu grundirnar eru oftast, at partarnir ikki kunnu semjast um ein sáttmála sum er samfelagsliga góðtakiligur ella at samráðingarslit kunnu føra til verkfall, sum er skaðiligt fyri samfelagsbúskapin.

Men tað er helst so, at sjálvur møguleikin fyri statsuppílegging ger, at fakfelagsleiðslurnar ofta rætta seg eftir meira beinleiðis tilmælum, so beinleiðis uppílegging gerst óneyðug.

Ein annar formur fyri beinleiðis uppílegging er, at staturin, saman við bæði arbeiðara-, arbeiðsgevara- og øðrum vinnufeløgum samráðast um heildarloysnir, sum á pappirinum altíð eru innrættaðar so, at allir samfelagspartar mugu lata nakað fyri at bjarga landinum. Sjálvt um veruleikin altíð er tann, at løntakarnir bera tær tungu byrðarnar, so er hesin formurin lættari at fremja, tí uppíleggingin er úrslit av »frælsum« samráðingum, og av somu grund ikki kennist so harðlig, sum beinleiðis lógardiktat.

Fakrørslan og inntøkupolitikkur

Umframt tær beinleiðis fylgjurnar sum inntøkupolitikkurin (les lønarpolitikkurin) hevur fyri livifótin hjá arbeiðaraklassanum, hevur hann álvarsamar fylgjur fyri fakrørsluna sum stríðsamboð í klassastríðnum.

Inntøkupolitikkur merkir at lønarviðurskiftini verða avgjørd uttan at arbeiðaranir hava nakra beinleiðis ávirkan. Avgerðirnar verða tiknar á høgum stigi — antin sum statsligt diktat, ella sum heildarloysnir í samráðingum millum statin, fakrørsluna og arbeiðsgevarafeløgini. Tílíkar korporativar atgerðir mugu logiskt føra til at arbeiðaraklassasjónarmiðini fána burtur í samarbeiðsandanum »vit eru øll í sama báti«. Og harav fylgjur at kapitalurin fær gott og væl sín part.

Ideologiskt kann tann av klassasamstarvslinjuni møguligi inntøkupolitikkurin føra til at býti millum løn og profitt ikki framvegis av fakfelagslimunum verður uppfatað, sum eitt úrslit av styrkini í klassastríðnum men eitt úrslit av tekniskum, búskaparligum útviklingi.

Skipanarliga er tað innlýsandi, at luttøka fakrørslunar í inntøkupoliiskum tiltøkum má føra við sær at sentraliseringin í fakrørsluni verður førd nógv longur enn tað er neyðugt og ynskiligt fyri eitt klassastríðsfelag, sum avgerandi hevur gott samband millum limir og leiðslu fyri neyðuni.

Saman um tikið hevur inntøkupolitikkur altíð til endamáls at hindra at herðingin í klassastríðnum skal kunna broyta lutfallið millum løn og profitt til frama fyri løntakararnar.

Tí er niðurstøðan tann, at sosialistar mugu berjast ímóti allari statsligari uppílegging í lønarviðurskiftir.